Evnisdagur í Stóra Pakkhúsi leygardagin

Suðuroyar Skeiðsdepil er nýggj verkætlan, sum leygardagin skipar fyri einum tiltaki í Stóra Pakkhúsi í Vági. Talan er um ein evnisdag undir heitinum "Kvinnur sum íbirtarar". Evni verður lýst á ymsan hátt, filmur vístur, fólk greiða frá og lagt verður upp til kjak. Luttøkan er ókeypis

SKEIÐ
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Suðuroyar Skeiðsdepil er ein verkætlan, sum hevur til endamáls at gera tað atkomuligt hjá fólki í útjaðaranum at fara á førleikamennandi skeið, ráðstevnur og onnur tiltøk. Mett verður, at tað hevur týdning, at fólk uttanfyri høvuðstaðarøkið fáa atgongd til førleikamennandi skeið. Fyri suðringar hevur hetta higartil ikki borið til uttan at liggja nátt í Havn, men við skeiðsdeplinum vóna stigtakararnir at broyta hetta.

Og leygardagin klokkan 14 skipar Suðuroyar Skeiðsdepil fyri evnisdegi í Stóra Pakkhúsi í Vági undir heitinum "Kvinnur sum íbirtarar".

Evnið "íbirtari" verður lýst á ymsan hátt, m.a. við framløgu, filmi, kjaki og kvinnur greiða eisini frá sínum royndum sum íbirtari.

Kjartan Kristiansen fer at greiða frá og greitt verður frá um íbirtaraskeiðið, sum Menningarstovan og Føroya Handilsskúli skipa fyri. Filmurin "Northern Women — New Images" verður vístur og Karin Brattaberg sigur frá sínum royndum sum íbirtari. Rúna Hjelm leggur fram um íbirtarahugskot í Suðuroynni og so er kjak á skránni. Evnisdagurin endar klokkan 17 og øll eru vælkomin at taka lut og luttøkan er ókeypis.

Meira fæst at vita um tiltakið á heimasíðuni www.suduroy.net, Vágs Kommuna hevur stuðlað tiltakinum.

Nýggjur depil

Suðuroyar Skeiðsdepil er ein 3 ára verkætlan innan førleikamenning og endamálið er at skipa fyri førleikamennandi tiltøkum saman við skúlum, privatpersónum, almennum stovnum og vinnulívinum í Suðuroynni. Førleikamennandi tiltøk fevna um undirvísing, skeiðsvirksemi, evnisdagar ráðstevnur og annað upplýsandi virksemi í hesum sambandi.

Grundhugsanin aftanfyri verkætlanina er, at økismenning og eginmenning fylgjast. Av somu orsøk er tað eisini av stórum týdningi, at fólk uttanfyri høvuðstaðarøkið fáa atgongd til førleikamennandi skeið. Fyri suðringar hevur hetta higartil ikki borið til uttan at liggja nátt í Havn og hartil rindað stóran kostnað í samband við skeiðini, siga stigtakararnir og vóna teir við nýggja deplinum at broyta hesi viðurskiftini. Og leygardagin 10. januar verður fyrsta tiltaki, nevniliga evnisdagurin "Kvinnur sum íbirtarar"

Skráin fyri evnisdagin er henda:
Kl. 14.00: Bjóðað verður vælkomin
Kl. 14.15: Kjartan Kristiansen greiðir frá um íbirting og um kvinnur sum íbirtarar
Kl. 14.30: Greitt verður frá íbirtaraskeiðnum fyri kvinnur, við Menningarstovan og Føroya Handilsskúli skipa fyri
Kl. 14.45: Filmurin "Northern Women — New images" verður vístur.
Kl. 15.15: Kaffisteður
Kl. 15.45: Karin Brattaberg fortelur um sínar royndir sum íbirtari
Kl. 16.15: Íbirtarahugskot í Suðuroynni (Rúna Hjelm leggur fram)
Kl. 16.30: Kjak
Kl. 17.00: Evnisdagurin endar

HEILSANIR

Hey Haldis-omma
Vit báðir ynskja tær hjartaliga tillukku við tí stóra degnum. Vit elska teg, og eru stoltir av at hava eina ommu, sum sær so gott út.
Heilsan Rúni og Fríði

Vit vilja á henda hátt takka hjartaliga øllum, sum vístu okkum tann stóra heiður á gullbrúðleypsdegi okkara 13. feb. Tykkum sum vaktu okkum við sangi, og øllum tykkum, sum komu inn á gólvið at heilsa uppá okkum og tykkum, sum góvu gávur, sendu blómur og fjarrit, tykkum, sum ringdu. Síðst, men ikki minst tykkum, sum hjálptu okkum á ein ella annan hátt. Síðani vilja vit ynskja øllum eitt Harrans signað nýggjár.
Osla og Haldur

Góði Pétur
Hjartaliga tillukku við 45 ára degnum. Hetta var ein góður túrur.
Heilsan 2 í vóru við

Góði Heðin
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 8. januar.
Heilsan abbi og omma

Góði Ári
Lukku og gleði á tínum 8 ára degi tann 9 januar. Her eru tit 3 fittir. Muss og klemm
Heilsan omma og abbi á Norðasta Horn

Góða mamma
Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
Heilsan Jákup, Fríða, Ann-Mari og Herluf

Góða elskaða Marianna
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 9. jan. Jesus pápi signi framtíð tína.
Ynskja omma og abbi í Havn

Góða elskaða Frida
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Má Jesus pápi signa framtíð tína. Vit elska teg.
Heilsan mamma og babba

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

ÚF
Morgunlestrar
12.–17. januar

Hans Jacob Sigvardsen á Argjum lesur

Sálmar:

Mánadagin 12. januar:
nr. 78 Jesunavnið aldri bliknar

Týsdagin 13. januar:
nr. 79 Eiitt navn á fold av øllum ber
nr. 80 Lat títt dýrabara navn

Mikudagin 14. januar:
nr. 49 Á knæ fyri Guð í Jesu navn
nr. 43 Tín miskunn, o, Guð

Hósdagin 15. januar:
nr. 42 Undir tínum veingjabreiði

Fríggjadagin 16. januar:
nr. 65 Drottur mín, Krist
nr. 66 Set alla gerð í Jesu navni á

Leygardagin 17. januar:
nr. 486 Hjá Jesusi eg søki frið
nr. 485 Allastaðir, hvar eg eri

Vika 2 – 7. januar
Vinnaratøl: **02 - 09 - 15 - 26 - 27 - 34**

Eykatøl: **28 - 31**

6 vinnaratøl:	**4.026.691,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**94.417,- kr.**
5 vinnaratøl:	**2.267,- kr.**
4 vinnaratøl:	**94,- kr.**
3 vinnaratøl:	**33,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

GJALDOYRAKURSIR

Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum		07.01.04	Ultimo des. 2003
USA	**Dollarar**	587,4000	595,7600
Bretland	**Pund**	1067,3100	1058,0700
Svøriki	**Króna**	81,8000	82,0200
Noreg	**Króna**	86,9100	88,4100
Sveits	**Frankur**	475,1000	477,4000
Ísland	**Króna**	8,3900	8,3100
Kanada	**Dollari**	456,6100	454,4900
Japan	**Yen**	5,5320	5,5673
	Evra	744,7700	744,4600

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ

360	FÁÐI	HORN	BJUR Í TYRL	FRÁ	GULL	TÝSK KONA	TONS	DÝR	NÆSTAN	KONA	ÓSIN	ORE-GON	REAN-MUR	FUGLUR	VERK	NITRO-GEN
24. DEC	1															
MAÐUR							MAÐUR KALK						SKEID SO?			JÓLA-SIÐUR
TRÝTT				KONA	VELTAN HVÍF -!!	2						GLER ITALIA			ESBERG	
KÁRUR								3						LEGG	TONS STATUR	
TITTUL			EINS BILUR			EITT STREYM-UR		KONA				KONA GULL				
RÓKA VEL					HJÁLÁÐ BOMM			ÍLATIÐ	MYRKUR	FR. BJUR SKRÍÐUR	4					
EINS				KELI-NAVN ICKI LIEGST			HENDA SILVUR				URAN VATN		LÓV-ORÐ MATUR			
URAN		ALTUR-VIÐ HÁGTÍÐ						5				SKELK-UR				
REX		PAKKAR STEKUR										VÁPNI				
	TÍL —? KONA						ROSS. KONA SVÁVUL					TONS FRAM-VEGIS		TRALGE	YETUR KARAK-TERIR	
MATUR-IN										AHJÁKT MARSTAL		6				
ALU-MINIUM			GREIÐ	7			MÍNA MAÐUR				HJÁORÐ HOYGGJ			GRÍHSBY		
GUNNAR —?			ÍFYLLA			OXI-GEN		TONS FÁTT		TJÓÐAR-FRAMM. KONA				DONSK OYGGJ	GRAHM "L"	
CRAM			KOKAL-AR HÁST			KÉPA-BUGV TONI						AFRIK. BJUR KYN				
SEINNA ?		HJÁHJÁÐ JOD			ÍLAT ABER-DEEN		8		NART ALFA				UNDIR FÓTI VOLT			TÝSK-LAND
24. DEC										9						

Vinnari:

Hans Jørgin Dam
Torkilsvegur 20
360 Sandavági

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: SANNLEIKSVITNI

S	A	L	V	A	D	O	R	A	L	L	E	N	D	E
A	N	A	L	F	A	B	E	T	Í	S	M	A		L	A
N	D	R		T	G		A		T	D		N	A	Í	N
N	A	Í	R	N			L				S	A	Í	N	T
L	L	X		A	N	T	Í	N	O	M	Í		R		O
E	Í		O	R	L	E	A	N	S		L	Ø	T	A	N
Í	G	O	R					T	A	O		E	T		
K	U	R	O	Í	S	T	A	N		L	A	R	R	A	R
Í	R	M	I	N	G	E	R	H	A	V		Í	M		
N		A	L	Í				N	A	O	M	Í			R
359	J	U	Í	S	B	U	R	G			F	A	N	T	A
T	Í	N	G	H	Ú	S	V	E	G	U	R		A		G
U	N	G	U		R	A		V	Í	N	A	R	L	A	G
L	O	Í	R	E			S	U	N	D		O		L	A
Í				E	Í	N	A	R		R	A	K	T	U	R
P	Í	N	O	C	H	E	T		C	Í	A		U	N	

Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

360

Loysunar-orðið: .....
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Póra Póroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt